– trygt og ómakaleyst til hús

INNI



# Dámlig tvíhús í Tórshavn

## Húsini standa væl fyri við góðum útsýni í vesturbýnum









### Fyrsta fatanin

Tú koyrir niðan í hugnaligu gøtuna í Vesturbýnum. Tú sneiðir inn í gøtuna og merkir alt fyri eitt tætta og heimliga umhvørvið beint uttan fyri hurðina. Húsini standa við blindan veg í barnavinarligum øki. Har er friðarligt, veðurgott og allir hugsandi stovnar eru nær við.

### Ljós og luft – stílur og snið

Komin inn um hurðina fært tú somu fatan. Góðska og dygd er sett høgt, og litirnir eru ljósir. Har er gongd / trappugongd við góðari trappu til ovaru hædd við køki og stovu í einum. Trin upp til hjúnarrúm, baðirúm og kømur. Í niðaru hædd er ein sjálvstøðug íbúð. Fert tú inn í stovuna, møtir tú einum stórum rúmi við stórum vindeygum. Tú kennir teg ikki innilokaðan á nakran hátt, men tvørturímóti sum ein part av grannalagnum, umhvørvinum, landslagnum, náttúruni og stóru verð, og tú kanst fara út á altanina at svala tær á og fáa tær luft. Alt er ljóst, svalligt og lætt. Gólvini eru úr góðum tilfari, og køkurin er ljósur og arbeiðsligur. Alt er liðugt, sera snøgt, væl gjørt og praktiskt.

### Innan

Í ovaru hædd er durur, stór gongd, vaskirúm / fýrrúm, trappa upp til køk / stovu við útgongd til altan, trin upp til hjúnarrúm, baðirúm við baðikari og 2 kømur, harav annað hevur útgongd til altan. Í neðra er sjálvstøðug íbúð. Har er inngongd, gongd, køkur / stova / kamar og baðirúm við brúsu.

### Fakta

**Adressa:** ..........Ravnsoyargøta 2, Tórshavn
**Byggiár:** ...........2007
**Hæddir:**............2
**Gólvvídd:**..........150 m²
**Grundøki:**.........325 m²
**Prísuppskot:** ...kr. 2.000.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**